*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini á almennu oljudøgunum í Havn:*

# Oljufeløgini brúkt hálva milliard uppá forkanningar

*-Vónandi fara vit at síggja so nógv og góð oljufeløg sum gjørligt bjóða uppá teigar á føroyskum øki, tá hetta verður aktuelt. Tey umleið 25 feløgini, sum eru við í forkanningunum á føroyskum, hava higartil brúkt eina hálva milliard kr. til arbeiðið*



*Løgmaður við til almennu evnisdagarnar eisini*

JAN MÜLLER

Alla hesa vikuna hava limirnir í Oljuráðleggingarnevndini verið til arbeiðis á Hotel Føroyum. Fyrst hava teir staðið fyri evnisdøgum fyri løgtingsmonnum, landsstýrismonnum og embætisfólki, og síðani hava teir greitt almenninginum frá nakað av tí, sum verður viðgjørt í frágreiðingini frá nevndini.

Væl av fólki hevði leitað sær niðan á Hotel Føroyar hósmorgunin, tá almennu evnisdagarnir vórðu settir av Arna Poulsen, vinnumálastjóra.

Síðani hevur tað gingið slag í slag við fyrilestrum og spurningum frá áhoyrarum.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini tosaði í sínum innleggi um jarðfrøði og oljuvánir og eitt komandi útbjóðingarumfar.



*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini greiðir frá. Myndir Gunder*

**Stórur áhugi**

Hvat viðvíkur møguleikanum at finna olju og gass í føroysku undirgrundini, so helt hann tað enn vera langt á mál, men ábendingarnar eru positivar hóast tær enn eru veikar.

Martin Heinesen vísti á, at millum 20 og 25 oljufeløg eru við í forkanningunum á tí føroyska økinum og hava feløgini higartil brúkt umleið eina hálva milliard krónur til hesar kanningar. Okkurt oljusamtak hevur einsamalt brúkt meir enn 100 mill. kr. til kanningarnar við Føroyar.

Martin Heinesen segði, at oljufeløgini hava eisini víst stóran vilja fyri at vera við í tiltøkum, sum føroyskir oljumyndugleikar hava tikið stig til og stuðlað her til Lopransborinngina, tilmælisumfarið (royndarnomination av blokkum) herfyri og nú eisini ítøkiligu ætlanirnar at fara undir miðvísar umhvørviskanningar.

Leiðarin á Oljufyrisitingini helt annars fyri, at trúvirðið hjá okkum sum mótparti hevur stóran týdning fyri oljufeløgini, sum skulu til at gera íløgur uppá fleiri hundrað milliónir kr., um so er at tey gera av at binda seg til fara undir leiting á føroyskum øki.

Bara ein einstøk boring um okkara leiðir kostar upp ímóti 150 mill. kr., so tað er greitt, at feløgini fara at hugsa seg væl um, áðrenn tey fara í gongd.

**Útbjóðing krevur nógv**

Martin Heinesen vísti annars á, at tað fer at krevja nógv av okkum, tá farast skal undir eitt útbjóðingarumfar. Hann kundi ikki siga eihilt neyvt, nær hetta umfarið verður, men tað fer so at ganga umleið eitt ár frá útbjóðan, til loyvi verður givið.

Tað er nevniliga sera arbeiðskrevjandi at skula viðgera allar tær mongu umsóknirnar, sum kunnu koma.

-Vónandi fáa vit nógvar og góðar umsóknir frá oljufeløgunum. Sum dømi um stóru arbeiðsorkuna, ið er neyðug í fyrireikingini av einum útbjóðingarumfari nevndi hann Danmark, har fá oljufeløg vóru við í seinasta útbjóðingarumfari. Hóast tað brúktu 20 jarðfrøðingar meira enn ein mánað bara at viðgera tann jarðfrøðiliga partin av umsóknunum. So hetta dømið vísir, at eitt komandi føroyskt útbjóðingarumfar fer at seta stór krøv til føroyskar myndugleikar.

Martin Heinesen segði seg vóna, at so nógv feløg sum gjørligt vera við í útbjóðingarumfarinum.

Stórur dentur fer frá føroyskari síðu at verða lagdur á eina sera effektiva leiting, tí tað kann eisini koma at geva okkum betri kort í eini 2. útbjóðingarumfari.

Tað er annars ymiskt, hvussu nógv verður boðið út í einum slíkum umfari, men bæði norðmenn og danir hava lagt dent á at bjóða so nógv sum gjørligt út frá byrjan fyri harvið at fáa kannað eitt so stórt øki sum til ber.

-Vit eru so í teirri hepnu støðu, at vit hava fingið gjørdar forkanningar á einum rættiliga stórum øki av landgrunninum, segði Martin Heinesen.

